gult cyan magenta svart



# ÚTBJÓÐING

Vegna Vestmanna kommunu verður arbeiðið at leggja nýggja vatnleiðing, uml. 3.500 m, frá Bjarnadalsá, til útlíkningarbrunn við Gjógvará, boðið út í almenna lisitatión. Arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku, ið umfatar jørðarbeiði og rørarbeiði.

Arbeiðið er ætlað at byrja í oktober 2000.

Lisitatión verður mánadagin 25. september 2000 kl. 14.00 á skrivstovuni hjá Vestmanna kommunu.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi týsdagin 5. september 2000 við at flyta kr. 2.000 á konto nr. 151.845-2 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, tá útbjóðingartilfarið er aftursent óskatt í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**
J.H. Schrøtersgøta 22, 100 Tórshavn
Tlf. 313522, Fax 310622

# *Við høvuðsgøtu í Havn*

kunnu * **handilshøli**
* **skrivstovuhøli**

fáast til leigu.

Hølini eru eisini væl egnað til

- matstovu
- teknistovu
- viðgerðarstovu
- undirvísingar- og fundarhøli
- o.m.a.

Skriva nøkur orð til
**BOS**
**Dr. Jakobsensgøtu 14-16**
**FR-100 Tórshavn**
**tel. 311951 - fax 319451**

**LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING**

# Lærlingar

## til Elding í Runavík og Elding í SMS Tórshavn

Til handlarnar í Runavík og SMS í Tórshavn søkja vit eftir lærlingi at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læruppláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 15. september 2000 og skal sendast til Elding í Runavík ella Elding í Tórshavn, alt eftir hvar tú vilt søkja:

**Elding í Runavík**
Heiðavegur
600 Saltangará

**Elding í SMS**
Postboks 1289
110 Tórshavn

**ELDING**
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

# Pedagogar

**Í sambandi við at Miðstovnurin í Gundadali 15. oktober 2000 letur upp útibarnagarð í Framhúsinum til 16 børn, verður søkt eftir tveimum pedagogum ávikavíst 40 og 30 tímum og einum hjálparfólki 30 tímar um vikuna.**

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har ítróttur og náttúran hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við viðring fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, og vera førur fyri sjálvur at taka avgerðir í arbeiði sínum, og at honum dámar at vera úti saman við børnunum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 316042, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Miðstovninum í Gundadali, 100 Tórshavn, í hendi, í seinasta lagi 15. september 2000.

Tórshavnar kommuna

**Kósin** seafood

# Kósin Seafood søkir seljara

Vit sóknast eftir seljara at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Sølu av frystum og saltaðum fiskavørum
- Samstarv við innkeypara, virkis- og góðskuleiðara
- Marknaðarførðslu

**Førleikakrøv:**
- Góð samstarvsevni og mennandi hugsunarhátt
- At arbeiða sjálvstøðugt
- Skal kunna arbeiða undir tíðartrýsti
- Góðan kunnleika til enskt
- Góðan kunnleika til Word, Excel og PowerPoint

**Fyrimunir:**
- Arbeiðsroyndir innan fiskivinnu og sølu
- Kunnleiki til franskt/spanskt/italienskt
- Kunnleiki til Navision

**Løn:**
Løn eftir avtalu

**Umsókn:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda innan 15/09-2000 til:

Kósin Seafood
Postrúm 290
FO-700 Klaksvík
Att.: Hanus Hansen

Um Kósin Seafood: Kósin Seafood er framleiðsluvirkið av frystum og saltaðumfiskavørum til catering og industri kundar. Útflutt verður til UK, USA, Spaniu, Italiu, Frakland og Týskland. Á Kósin Seafood starvast uml. 200 fólk.

# Umlættingar-familiur

**Barnaverndin hjá Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir familjum úr øllum Føroyum, ið hava hug at gerast umlættingarfamiljur.**

Ein familja er umlættingarfamilja, tá hendan átekur sær at hava barn/børn við serligum tørvi búgvandi í t.d. vikuskiftum ella ávíst dagatal í senn, alt eftir hvat avtalað verður. Hetta fyri at umlætta familjuna og kanska barnið við, og eisini verða umlætting hjá familjum við manglandi trygdarneti.

Ein familja kann gerast umlættingarfamilja hjá ávísum barni, ella til at taka tá tørvur er.

Sum umlættingarfamilja fáa tit:

~ nógv samband við onnur børn
~ spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
~ neyvt fakligt og starvsligt samstarv við sosialu deild og stuðulsfólkaskipanina hjá kommununi
~ undirvísing og skeiðvirksemi innan viðkomandi evnir
~ samsýning

Vit vænta av eini umlættingarfamilju:

~ at hon er vælvirkandi
~ at hon hevur stundir til børn
~ at hon hevur gevandi samband við børn
~ at hon er samstarvshugað mótvegis familjuni hjá barninum, barnarverndini og øðrum samstarvspørtum

Um tit hava áhuga og ynskja at fáa meira at vita, kunnu tit venda tykkum til sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu, tlf. 315160, og spyrja eftir Sjúrða Johannesen ella Anna Mariu Troest.

Umsóknirnar skulu stílast til barnaverndarnevndina hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn.

Tórshavnar kommuna

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum. Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.**

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

# Til sølu

Tvey grundstykkir til dupulthús, matr. nr. 50u og 50v við Stoksoyravegin, 700 Klaksvík.

**Tlf. 456532 - 216532**






# Bassi hevur føðingardag

**Í komandi viku ferðast hann runt og vitjar sparikassadeildirnar eftir hesi skrá:**

| Dagur | Kl. | Deild |
|---|---|---|
| Mánadagur 4/9 | 12.00-13.00 | Hósvík |
| | 12.30-13.30 | Vestmanna |
| | 13.45-14.45 | Norðskála |
| | 13.45-14.45 | Kvívík |
| | 15.00-16.00 | Eiði |
| | 15.00-16.00 | Kollafjørður |
| Týsdagur 5/9 | 12.30-13.30 | Sørvágur |
| | 13.45-14.45 | Miðvágur |
| | 15.00-16.00 | Sandavágur |
| Mikudagur 6/9 | 12.30-13.30 | Skálavík |
| | 13.00-14.00 | Hvalba |
| | 13.45-14.45 | Sandur |
| | 14.30-16.00 | Tvøroyri |
| | 15.00-16.00 | Skopun |
| Hósdagur 7/9 | 14.00-17.00 | Sverrisgøta, Tórshavn |
| Fríggjadagur 8/9 | 12.30-13.30 | Gøta |
| | 12.30-13.30 | Strendur |
| | 13.45-14.45 | Fuglafjørður |
| | 13.45-14.45 | Skála |
| | 15.00-16.00 | Runavík |

**Um tú fert inn í eina deild at tøma Spari-Bassan í komandi viku, fært tú eina spennandi gávu frá Føroya Sparikassa.**

**FØROYA SPARIKASSI**

# Ferðaráð Føroya søkir Samskipara

Ferðaráðið søkir ein samskipara í sambandi við at ein heildarætlan fyri skelting skal gerast fyri Føroyar sum ferðamannaland. Talan er um eitt avmarkað starv í 6 mánaðir.

Arbeiðið verður lagt til rættis av samskiparanum í samstarvi við deildina Innlendis Menning á Ferðaráðnum og Landsverkfrøðingin. Samskiparin refererar til stjóran á Ferðaráðnum.

**Endamálið við starvinum:**

- Gerð av einari fullfíggjaðari kravfesting til skelting, nátt- og tvátthús, dvalarvikar og tjaldingarpláss í Føroyum.
- Kravfestingin skal verða eitt víðari arbeiðsamboð hjá Vinnumálastýrinum, kommunum, landsverkfrøðinginum og Ferðaráðnum.

**Fylgjandi førleikar og royndir eru ein fyrimunur:**

- Royndir frá starvi við prosjektleiðslu og samskipan.
- Holla vitan um Føroyar og føroysk viðurskifti sum heild og sum ferðamannaland.
- Kunnleika til lendis- og matrikulviðurskifti í Føroyum.
- Kunnleika til náttúruviðurskifti.
- Kunnleika og atlit til føroyska siðvenju ísv. ferðing í náttúruni.
- Kunnleika til almenna og kommunala fyrisiting herundir arbeiðsgongdir.
- Hollan kunnleika til edv.

**Neyðugt er at tann, ið settur verður:**

- Er førur fyri at samskifta sera breitt.
- Megnar at hava yvirlit yvir fleiri málum í senn og samla træðrir.
- Er fleksibul, tá arbeiðið krevur nakað av ferðing í Føroyum og møguliga uttanlands.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hera Niclasen, stjóra, ella Annleyg Lamhauge, Innlendis Menning, á tlf. 316055.
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum v.m. skal vera Ferðaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. september 2000.

**Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**Fo -110 Tórshavn**

Ferðaráð Føroya
www.tourist.fo

Sosialurin - 311820



**Ahorn parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 516,-
Olja 572,-



**Ask parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~438,-~~
**TILBOÐ** 388,-
Olja 478,-



**TILBOÐ** Laminat Professional 11000
Eik-Bók-Ahorn-Kirsuber-Merbau
10 ára garanti *Spar 40,-*
**BERT 159,-**



**Bók parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~338,-~~
**TILBOÐ** 298,-
Olja 398,-



**Eik parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað ~~338,-~~
**TILBOÐ** 298,-
Olja 398,-



**Merbau parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 396,-
Olja 490,-



**Birk parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 448,-



**Kirsuber parkett 3 stav**
14x200x2000 mm.
Lakkerað 490,-

**Profa Farvur**

**Á Hálsi, Tórshavn** Tel. 31 92 20
**Tvøroyri** Tel. 37 10 81
**Saltangará** Tel. 44 91 49

Sosialurin - 311820